## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Umsorgan fyri foreldraleysum børnum í Russlandi

**Í hesi vikuni fara teir báðir, Jógvan Skýlindal í Havn og Marner Magnussen í Vági til Russlands at hyggja at arbeiði, sum fer fram á fýra ymiskum heimum fyri foreldraleys børn**

**Tíðindaskriv**



*Jógvan Skýlindal og Marner Magnussen fara í hesi vikuni til Russlands at hyggja at arbeiði, sum fer fram á fýra ymiskum heimum fyri foreldraleys børn*

Børnini á hesum heimunum telja tilsamans 500, sum øll bera sálarlig sár, tí tey ongantíð hava fingið umsorgan frá sínum foreldrum og eru heimleys. Børnini eru í aldrinum 6 til 18 ár.

Sambært teimum almennu tølunum úr Russlandi, enda 19 prosent av øllum foreldraleysum børnum í fangahúsi, fá ár eftir at tey eru liðug við skúlan, 10 prosent taka lívið av sær, 32 prosent verða arbeiðsleys og 39 prosent verða verandi heimleys.

Tilsamans 700.000 russisk børn liva uttan umsorgan frá sínum foreldrum. Tey almennu tølini vísa eisini, at talið av foreldraleysum børnum alsamt veksur. Ógvuliga lítið verður gjørt fyri tey foreldraleysu, og tí eru hesi børnini í einum áhaldandi bardaga fyri at yvirliva.

Russisku skúlamyndugleikarnir vísa hesum hjálpararbeiði stóra vælvild. Nógv onnur heim fyri foreldraleys børn eru opin fyri hesi tænastuni, sum er bygd á tað »dagligu umsorganina fyri tí dagliga tørvinum.«

**Umsorgan**

Í juni mánaði 2004 byrjaði Jógvan Skýlindal eitt stuðulsarbeiði í Føroyum undir heitinum »Umsorgan.« Arbeiðið fevnir um at upplýsa um tann ovurhonds stóra tørvin, tey foreldraleysu russisku børnini hava, og at geva øllum føroyingum høvi at stuðla teimum fíggjarliga.

»Tað hevur verið ómetaliga uppbyggjandi at síggja, hvussu nógv av okkara fólki eru til reiðar at hjálpa øðrum. Sum dømi kann nevnast, at á jólum 2004 kundu vit geva 222 børnum nýggjar vetrarskógvar«, sigur Jógvan Skýlindal.

Arbeiðið verður gjørt í tøttum samarbeiði við tænastuna »Generation Of Hope«, sum russarin Pavel Ignatiev, sum vitjaði í Føroyum fyri hálvum øðrum ári síðani, stendur fyri. Hann sigur soleiðis um hjálpararbeiðið í Russlandi: »Nógv av børnunum fara ígjøgnum svárar sorgarleikir og royndir í teirra unga lívi. Vit bjóða bíbilska vegleiðing til teirra sum hava verið gjøgnum ræðuligar royndir og bera sálarlig og likamlig sár eftir upplivingar tey hava verið ígjøgnum.

Umleið 15-20 bíbliutímar um mánaðin verða hildnir í hvørjum heimi sær, har vit boða børnunum evangeliið og læra tey at taka andaligar avgerðir hvønn dag. Vit biðja saman við børnunum og svara teirra spurningum.

Aftaná ein av bíbliutímunum segði ein tólv ára gomul genta um mammu sína: »Hevði mamma vitað hvat Bíblian lærir, hevði hon ikki rýmt frá mær.« Fleiri av børnunum skilja meginreglurnar í Bíbliuni um lívið í heild og liva samsvarandi tí.

Vit hjálpa eisini teimum foreldraleysu eftir at tey eru liðug í skúlanum.

Aftaná at tey foreldraleysu eru farin úr heimunum, koma tey javnan til okkara fyri at fáa vegleiðing og hjálp. Vit knýta eitt lívlangt vinarband við foreldraleys børn og hjálpa teimum gjøgnum lívið. Vit útvega teimum tað mest neyðturviliga til gerandisdagin.

Tað er eingin loyna at foreldraleys børn í Russlandi eiga ikki so mikið sum tað mest grundleggjandi lívið krevur: Klæðir, skógvar og tað sum er ein partur av persónliga reinførinum. Vit eru har fyri at útvega teimum hesar lutir«, sigur Pavel Ignatiev frá Generation of Hope.

**Øll kunnu vera við**

Øll kunnu vera við í hesum hjálpararbeiði. Allur fíggjarligur stuðul til arbeiðið kann flytast inn á hesa kontuna: Umsorgan v/Jógvan Skýlindal, konto: 9870 - 102.156.8 í Suðuroyar Sparikassa.

Innkomin peningur verður hvønn mánað fluttur beinleiðis inn á kontuna hjá Generation Of Hope í Moskva. Av tí at vit arbeiða sjálvstøðugt, og ikki eru bundin at nøkrum millumliði, og av tí at vit gjalda fyri allar flytingar sjálvi, kunnu vit gleðast um, at einki verður nortið við tær einstøku gávurnar, men at allur innkomni peningurin kemur 100 prosent til arbeiðið millum tey 500 børnini vit arbeiða fyri, sigur Jógvan Skýlindal. Heimasíða:

www.umsorgan.org

# Koyrilærarar á skúlabeinki

**Nýtt frálærutilfar er á veg til teirra, sum hereftir skulu taka koyrikort**

**Koyrikort**



*Koyrilærarar mugu eisini á skeið viðhvørt. Her fáa teir kunnleika um nýggja frálærutilfarið til koyriroyndina*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

– Hvat er miðfløttarmáttur?

Ein slíkan spurning, hava tey ið tóku koyrikortið kunnað fingið sum ein part av skrivligu royndini.

Nógv hava havt trupult við at skilja øll tey føroysku orðini, og hava tí havt ilt við at svara spurninginum, av teirri einfaldu orsøk, at tey ikki vistu hvat hetta orðið merkti.

Men nú er liðugt við hesum. Nýtt frálærutilfar skal nú brúkast, og har verða slík orð sum hetta tikin út, og meiri vanlig orð sett í staðin: Har spurningurin »Hvat er miðfløttarmáttur?« fyrr stóð at lesa, skulu næmingarnir nú svara uppá sama spurning, men við øðrvísi og meiri skiljandi orðum: »Hvat er sentrifugalkraftin?«.

Nevnast kann, at speedari nú ikki longur fer at eita skyndil, – men altso speedari!

**Á skúlabonk**

Skulu lærarar í fólkaskúlanum hava nakað nýtt at læra frá sær, so er neyðugt at teir fara á skeið við jøvnum millumbilum.

Vinnumálaráðið hevur nú framt broytingar í ferðslulógini, har broytingar eisini eru gjørdar í kunngerðini um koyrikort. Og her ger tað seg galdandi hjá koyrilærarum, sum hjá lærarum í fólkaskúlanum.

Teir noyðast eisini á skúlabonk viðhvørt - soleiðis at støðið í undirvísingini hjá teimum, sum taka koyrikortið er í lagi, og ikki minst at undirvísingin er eins frá einum lærara til annan.

Herfyri vóru 18 koyrilærarar á skeiði í Havn, har teir m.a. fingu kunning um ta nýggju lærubókina, sum nýtast skal tá koyrikortið skal takast.

Her er talan um frálærutilfar, sum alla tíðina kann – og skal! – verða dagført. Hetta verður nevniliga gjørt við einum ringbindi, hvørs tilfar verður dagført reguliga. Á henda hátt verður tilfarið altíð á hægsta støði.

**sb.**

**Dagurin**

**28. september. Vencelaus,** deyður í 935. Sonur hertogan Vratislav í Bøhmerlandi. Av øvund læt heidni bróðirin Boleslav hann myrða. Gjørdist verndarhalgimenni hjá Bøhmen og er jarðaður í Sankta Vensils Kapelli í Vituskirkjuni í Prag, sum er bygd oman á toftunum av tí rotundu, hann sjálvur læt byggja.

Føroyska navnið er Vensil. Hammersheimb-ættin kemur úr Bøhmerlandi, og Vensil próstur skrivaði navn sítt Venceslaus Ulricus Hammersheimb (1819-1909).

Navnið er slaviskt og merkir *hin heiðurkrýndi.*

*Lucas Debes doyði hendan dagin í 1675, 52 ára gamal.*